Turkur í Runavík

2. deild: Dysturin millum næstbestu liðini hjá NSÍ og KÍ endaði sum hann byrjaði

2. deild: NSÍ–KÍ 0–0

Klaksvíkingar komu í góðveðrinum leygardagin til Runavíkar at gera triðju royndina fyri at koma á stigatalvuna. Tað var týðuligt, at tað ráddi fyrst og fremst um hjá teimum um ikki at tapa, og tað eydnaðist. Hvørki liðið megnaði at skora mál, og tað er ein staðfesting av, at bæði hjá NSÍ og KÍ er talan um málturk á næstbesta liðnum. Í trimum dystum hevur KÍ skorað eitt mál, og NSÍ hevur ikki skorað í 180 minuttir (í fyrsta dystinum vunnu teir 4–1 á HB).

KÍ var varðið í útgangsstøðuni, og tað hevði við sær, at teir á heimaliðnum høvdu bóltin nógv. Teir høvdu eitt sindur ilt við at spæla seg til upplagdar møguleikar. Meinhard Joensen í KÍ málinum var tryggur, tá høgir bóltar komu innfyri, og tá Høgni á Lakjuni tvær ella tríggjar ferðir var leysur, eydnaðist tað honum ikki at fáa mál.

Størsta møguleikan fekk NSÍ, tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Tá bríkslaði Petur Hansen fyri brotssparki, tí ein beinini vóru tikin undan einum av heimamonnunum, sum innanfyri brotsteigarsamankomingina í vinstru var á veg út úr brotsteiginum. Vongverjin í høgru, Dagfinn Olsen royndi úr ellivu metrum, KÍ málverjin tveitti seg í fulla longd til høgru fyri seg sjálvan og hálvbjargaði.

Klaksvíkingar kendu seg skerdar, tá teir komu til Runavíkar. Tað komst av, at fleiri skaðar í 1. deild høvdu havt við sær, at tað minkaði burturav betra endanum í 2. deild. Og tað gjørdist ikki betur, tá tveir av stuðulsspælarunum noyddust at taka seg burturúr. Jóhannes Færø noyddist út longu í 1. hálvleiki, og Finn Baldvinsson fór út tíðliga í 2. hálvleiki.

Hóast teir høvdu nógv fólk aftarlaga, so lá tað alla tíðina í luftini, at KÍ hevði møguleika at skora í snarálopi. Eyðun Klakstein skapti nógv við bóltinum, og Helmar Lassen hevði tveir stórar møguleikar, sum hann sendi við síðuna av og upp um málið hjá Ólavi Højgaard.

Í fjør var Kári Sigvardsen ein av stuðulsspælarunum á besta NSÍ liðnum. Tíðliga í ár varð hann skaddur. Nú er hann komin so frægt fyri seg aftur, at hann leygardagin var vongverji í vinstru á næstbesta liðnum.

Leygardagin skal KÍ, sum við javnleikinum kom á stigatalvuna, spæla í Hvalba. Higartil hevur Royn einki stig fingið. NSÍ skal ikki ferðast so langt. Teir skulu bara um Gøtueið at spæla móti GÍ.

JH

Tíggju til Magna

Magni Jarnskor hevði tíggju rættar krossar hetta vikuskifitð, men tað rakk ikki til vinningar

Jákup Mørk

Seinast Magni tippaði her í Sosialinum, hevði hann gitt rætta tekni við 11 av teimum 13 dystunum, og tað ferðini rakk tað eisini til ein lítlan vinning.

Hesu ferð gekk ikki heilt so væl hjá Magna. 10 av krossunum vóru settir á rætta stað, men hetta rakk ikki til nakran vinning. Magni hevði hesu ferð trý røtt U-tekn, og hetta viðførir, at sannlíki fyri at raka hægsta garantiið er rættuliga lítið.

Torførari

LÍkt er til, at tað er torførari at gita úrslitini, nú ensku dystirnir ikki eru á veddingarseðlinum.

Í øllum førum hevur úrtøkan verið munandi verri, tá talan hevur verið um danskar og týskar dystir, har føroyingar ikki kenna liðini eins væl og tey ensku.



Úrslitini um vikuskiftið

Dystur	Úrslit	Tekn
1 Dalum-B 93	0-4	2
2 FC Aarhuus-Fremad Amarger	1-0	1
3 Aalborg Chang-B 1913	1-4	2
4 Brønshøj-Hjørring	0-4	2
5Bielefeld-Bayern München	0-3	2
6 Dortmund-Schalke 04	1-1	X
7 Freiberu-Kaiserslautern	2-1	1
8 Hamburger SV-Unterchaching	3-0	1
9 Hansa Rostock-VfB Stuttgart	1-4	2
10 Leverkusen-Frankfurt	4-1	1
11 Ulm-Wolfsburg	2-0	1
12 W. Bremen-Duisburg	4-0	1
13 1860 München-Hertha Berlin	2-1	1

Vinningar:

13 røtt	27.079 kr.
12 røtt	595 kr.
11 røtt	57 kr.
10 røtt	13 kr.

Soleiðis veddaði Magni

Dystur	Tekn	U
1 Dalum-B 93	2	
2 FC Aarhuus-Fremad Amarger	1X2	X
3 Aalborg Chang-B 1913	1X2	**2**
4 Brønshøj-Hjørring	1X	X
5Bielefeld-Bayern München	2	
6 Dortmund-Schalke 04	1X2	1
7 Freiberu-Kaiserslautern	X2	2
8 Hamburger SV-Unterchaching	1X	**1**
9 Hansa Rostock-VfB Stuttgart	12	1
10 Leverkusen-Frankfurt	1	
11 Ulm-Wolfsburg	X2	2
12 W. Bremen-Duisburg	1X	**1**
13 1860 München-Hertha Berlin	1X2	X

Úrslit

Røtt í skipanini: 10

Røtt U-tekn: 3

Vinningar

Eingin

Málini koma seint

Jákup Mørk

Um føroysku fótbóltsleikararnir orka ov illa, skulu vit lata vera ósagt, men í øllum førum er tað ein sannroynd, at nógv tey flestu málini verða skotin móti endanum av dystunum.

Nú fýra umfør eru leikt av kappingini, eru 67 mál skotin í landskappingin, og av hesum eru heili 18 skotin innan fyri seinastaa korterið av dystunum

Byrja varliga

Líkt er eisini til, at sannlíki fyri málum er størri, longur líður út á dystin, og eitt nú verða sera fá mál skotin fyrsta korterið.

Einans 6 ferðir er mál skotið somikið tíðliga í dystinum, og av hesum varð helmingurin skotin í Gundadali sunnudagin.

Enn er sjálvsagt stutt útliðið á fótbóltsárið, so ikki ber so væl til at gera sær nakra niðurstøðu burtur úr hesum, men kortini.

Hevur tú ringa tíð, og ikki hevbur stundir til hyggja at einum heilum dysti, eru bestu hyggjuráðini kanska at gloyma fyrra hálvleik, og ístaðin verða hjástaddur tá málini koma.

Myndin sýnir, nær málini hava verið skotin higartil í ár



Skeið í AUTOCAD
6.-8. juni 2000

Undirvíst verður í: Auto-Cad 2000. Skeiðið er fyri fólk, sum hava royndir í at arbeiða við Auto-Cad og sum skulu hava dagført sína vitan um Auto-Cad

Skeiðleiðarar: Erik Hansen, Århus Tekniske Skole

Skeiðkostnaður: Kr. 3.500,- (skal gjaldast við tilmelding)

Tilmelding: **áðrenn 31. mai 2000**

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag-fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16).

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn

Goymslulærlingur
søkist, at byrja sum skjótast!

Læran umfatar samskifti við viðskiftafólk, skeið og annað fyrifallandi arbeiði á goymsluni.

Vit vænta, at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita

Tað er ein fyrimunur um tú hevur

Skrivlig umsókn skal sendast til

team 85 • 31 65 11

NISSAN PEUGEOT OPEL

Meinhardt Arge bilar
Falkavegur • Postrúm 3171 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 61 61 • Fax 61 61 60

Kinesolog Oda Fuglø
er at hitta á tel. 456532 frá 17/5 til 26/5

- Psykisk, fysisk og kemisk viðgerð
- Innlæringstrupulleikar
- Hormonbalansuviðgerð v.m.

Navnakapping um meg!

Hvussu skal eg eita?

Eg havi onki navn fingi enn!

Eg vil fegin hava eitt navn!

Kanst t ikki finna m r eitt fitt navn?

flll b¿rn fr 0-12 r kunnu senda okkum uppskot um navn til fitta hvalin, sum er sparib ssan. Hana kanst t ogna t r hj okkum.

Saman vi t navni, sum t heldur, b ssan skalt eita, ert t eisini v lkomin at senda okkum eina tekning av einum hvali, sum t heldur h skar v l til navni , sum t sendir inn.

Givnar ver a vir isl¿nir til tey n¿vn, sum ver a vald t, sum best h skandi.

1. vir isl¿n kr. 1.500
2. vir isl¿n kr. 1.000
3. vir isl¿n kr. 500

Eru fleiri uppskot um vinnandi n¿vnini, ver a vinnararnir funnir vi lutakasti.

T kanst senda t tt uppskot og m¿guliga tekning av hvalinum br vbj lva merktur "Sparib ssan' til:

SUÐUROYAR SPARIKASSI
P.O. Box 2 · FO-900 Vágur
Telefon +298 37 30 64 · Telefax +298 37 33 40

SUÐUROYAR SPARIKASSI
N. Finsensgøta 7 · FR-100 Tórshavn · Faroe Islands
Telefon +298 32 19 98 · Telefax +298 32 19 97

Eisini ert t v lkomin inn sparikassan vi t num uppskoti.

Uppskotini skulu ver a okkum hendi seinasta lagi 16. juni 2000

Sparikassin tilskilar sær tó til ikki at n‡ta naka› av innkomnu uppskotum.

www.reproz.com

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Skipper

Norsk autolinefartøy M/S Suderøy søker erfaren skipper til linefiske etter blåkveite og kvitkveite på Grønland. Gode betingelser. Avgang ca. 15. juli.

For nærmere opplysninger kontakt Suderøy Havfiske A/S på telefon: 004770026056
mobil: 004790517981
faks: 004770029086